

## Svikarar fáa grið

Í Italia hevur ein meiriluti í Senatinum samtykt eina log, sum gevur skattasnýtarum og øðrum svikarum grið. Tað vóru stjórnarflokkarnir hjá Silvio Berlusconi, forsætisráðharra, sum samtyktu uppskotið, sum sambært andstøðuni er ein gáva til mafiuna og onnur, sum fáast við fíggjarligan kriminalitet. Italska dómarafelagið hevur eisini funnist hvassliga at samtyktini. Lógin fær ikki gildi, fyrr enn Giorgio Napolitano, forseti, hevur staðfest hana. Forsetin hevur sagt, at hann tekur ikki støðu til innihaldið í lógini, fyrr enn hann hevur fingið hana til staðfestingar.

# Hetland afturútsiglt – biðjur Føroy

**SHEFA-2 kaðalin hjá Føroya Tele millum Skotland og Føroyar kann nú av álvara koma hetlendsku tjóðini til góðar. Undirstøðukervið í Hetlandi er heilt ótíðarhóskandi, og tí hevur landspartatingið í oyggjunum heitt á Føroya Tele um at byggja upp eitt nútímans fjarskiftiskervi**

FJARSAMSKIFTI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Marvin Smith, stjóri á búskaparligu menningardeildini í hetlendska landspartatinginum á vitjan hjá Føroya Tele, her saman við Páll Vesturbúð, stjóra í FT Net*

*Mynd: Jan Müller*

Hetland er tað av okkara grannalondum, sum er fullkomiliga afturútsiglt, tá talan er um fjarsamskifti og kunningartøkni. Langt er frá múgvandi stórbýnum London og norður til oyggjarnar í Atlantshavi, Hetland, Orknoyggjarnar og Hebridurnar. Hetta er nakað, sum oyggjarbúgvarnir í mongum førum kenna aftur í gerandisdegnum. Og tað er ikki sørt, at teir øvunda føroyingum ta støðu, sum vit eru í, har eitt nú undirstøðukervið er so mikið væl útbygt, at nærum øll húski og fyritøkur hava atgongd til breiðband.

Myndugleikarnir í Hetlandi vilja nú sleppa at bøta um hesa ótolandi støðu, sum oyggjarnar eru í. Tað er í hesum sambandi, at eitt umboð fyri Shetland Island Council vitjar í Føroyum í hesum døgum. Marvin Smith er stjóri á búskaparligu menningarstovuni í landspartatinginum í Hetlandi. Hansara arbeiðsøki fevnir m.a. um fjarsamskifti og kunningartøkni.

### Alt steðgaði upp

Hvussu álvarslig støðan er í Hetlandi í dag kom týðuliga til sjóndar, tá alt sambandið við umheimin slitnaði herfyri. Hetta var einki minni ein ein vanlukka. Allar týðandi samfelagsfunktiónir steðgaðu upp, eitt nú varð flogvøllurin stongdur. Hetta hevur nú veruliga sett gongd á málið um betri fjarskiftissamband millum Hetland og umheimin.

-Vit mugu hava eitt skjótari og tryggari fjarskiftissamband við umheimin skulu vit sum samfelag ikki dragna heilt afturút sigur Marvin Smith og vísir á, hvussu langt føroyingar eru komnir í mun til tey í Hetlandi.

Hann er tí komin til Føroya fyri rætt og slætt at biðja um hjálp. Og hesa hjálpina heldur Føroya Tele seg kunna veita. Lykilin til hesa tænastu er eingin minni enn SHEFA-2 kaðalin, sum gongur úr Skotlandi til Føroya umvegis Hetland.

Tað er ikki so langt síðani, at sami Shefakaðalin varð knýttur í fleiri framleiðslupallar vestan fyri Hetland. Sami kaðalin kann nú eisini koma hetlendingum á landi til góða.

Marvin Smith, sum ikki dylur fyri, at hann er rættiliga ovfarin av, hvussu væl føroyska samfelagið er útbygt ikki minst, tá tað snýr seg um undirstøðukervið, greiðir frá, at stóra bretska fjarskiftisfyritøkan British Telecom (BT) hevur heilt forsømt oyggjarnar norðan og vestan fyri Skotland, tá talan er um at fáa íbúgvunum her ein nútímans og vælvirkandi infrastruktur.

Í dag ræður tí einki minni enn miðaldarlig líknandi støða á KT økinum í Hetlandi samanbera vit við eitt nú Føroyar sigur Marvin Smith. Hóast fleiri veitarar eru so manglar sjálvur infrastrukturin, sum kann tryggja eitt gott, skjótt og trygt fjarskiftissamband millum stovnar, vinnufyritøkur og vanlig húski í Hetlandi og útheimin.

### Leggja 40 kilometrar av fiburkaðali

Hóast ringu støðuna, so er Hetland kortini í eini sera hepnari støðu, tí Shefakaðalin er har, og nú er bert eftir at troyta møguleikarnar hann gevur. Kaðalin fer sum er í land í Hetlandi, og nú arbeiða fólk hjá Føroya Tele saman við hetlendingum við eini ítøkiligari ætlan at leggja ein 40 kilometrar langan fiburkaðal frá kaðalstøðini á strondini til Lervickøkið. Síðani kann farast víðari haðani og leggja út breiðband til vinnufyritøkur og húski í høvuðsstaðnum og økjunum nærhendis. Marvin Smith heldur tað fer at taka tíð at koma út kring alt landið, men mest umráðandi er at knýta Lervick økið í Shefa-2, tí harvið kemur Hetland inn í KT og nútímans fjarskiftisøldina við eitt.

Hjá Føroya Tele síggja tey nakað heilt stórt og spennandi í hesi nýggju avbjóðingini. Tað hevur leingi verið eitt ynski og eitt mál hjá Føroya Tele at kunna vera við til at veita tænastur uttan fyri Føroyar eisini, og her kemur so ein rættiliga stór uppgáva, har tú sum fyritøka skal til at byggja upp ein spildurnýggjan infrastruktur, sum fevnir um eitt heilt samfelag.

Páll Vesturbúð, stjóri í FT Net og tann, sum hevur verið við til at menna samvinnuna við eitt nú oljufelagið BP í sambandi við fjarskifti til og frá fleiri oljupallum, heldur uppgávuna vera eina áhugaverda avbjóðing. Føroya Tele hevur nettupp royndirnar og ekspertisuna til at átaka sær eina slíka uppgávu, og nú verður so